# Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy og Klaksvíkar HF-skeið

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða – alt eftir lærigreinasamanseting – frá 1. august 2005 **6-7 størv** sum, adjunktur/lektari leys at søkja í hesum lærugreinum:

**Alisfrøði, alis-/evnafrøði, donskum, enskum, føroyskum, ítrótti, latín, lívfrøði, miðlakunnleika, samfelagsfrøði, støddfrøði, søgu, tónleiki og týskum.**

Harumframt eru **2 ársvikariat** leys í lærugreinunum:

**Donskum og føroyskum** (møguliga saman við lærigrein nevnd omanfyri)

Umsøkjarar skulu tilskila, í hvørjum lærugreinum teir hava undirvísingarførleika (høvuðsgrein, hjágrein ella annað), og um teir hava námsfrøðiliga útbúgving. Umsøkjarar, ið ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, og sum verða settir, skulu í august mánaði taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan í fast starv at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, og um teir ikki hava tað, at teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vitan um hetta. Harumframt fer skúlin at leggja dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, nýggir arbeiðshættir og KT eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans ella við at vitja heimasíðu skúlans: www.shey.fo

Starvssetanin verður sambært sáttmála millum Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF) og Fíggjarmálaráðið. YF-umsóknarbløð fáast frá Yrkisfelagnum ella frá skúlanum
(tlf.: 44 40 24, faks: 44 47 97).
Umsóknin skal **stílast til** rektaran, og **sendast til** Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy, att.: Sámal í Skorini, rektara, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, **í seinasta lagi 3. mai 2005.**

**Frítíðaravloysarar**

# Manning



Við hesum verður søkt eftir stýrimonnum, maskinmeistarum, dekkarum og kateringfólki til strandfaraskipini.

Freistin at søkja størvini er tann 2. mai 2005.
Sí lýsingina á heimasíðu okkara **www.ssl.fo**

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 278**, P/F Vatnsoyrar Snikkaravirki, 385 Vatnsoyrar.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Hans Elmar Poulsen, 385 Vatnsoyrar
**Innkomin sum stjóri:** Heðin Poulsen, 385 Vatnsoyrar

Skráseting Føroya
tann 19. apríl 2005

Kristin Balle

# KOYRISKÚLIN Í MIÐBÝNUM

Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar mánadagin 25. apríl 2005 kl. 17.00

Avgreiðir øll koyrikort

**NIELS P. OLSEN**
TEL 31 00 10 · FARTEL 22 30 41

**BJARKI JOHANNESEN**
TEL 31 48 45 · FARTEL 21 48 45

**ÓLAVUR ARGE**
TEL 31 40 02 · FARTEL 21 40 02

**MARNAR ANDREASEN**
TEL 31 43 81 · FARTEL 21 43 81

Sosialurin 341800

# Pedagogur til Rúnarveg

Innan Heimarøktina og Serforsorgina, og stovnar undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt pedagogstarv leyst til setan 15. mai 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt tænastumannastarv. Løn og setanartreytir vera eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønarstigini 24-33 eftir lønartalvu frá 01.10.04

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeitt verður í skiftandi vaktum, tvs. tað eru dag, kvøld og náttarvaktir. Eisini verður arbeitt í vikuskiftum og á serstøkum halgidøgum.

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið á Líknagøtu 1 í Saltangará, ið er undir somu leiðslu sum Bústovnurin og Sambýli á Rúnarvegi. Tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Bert umsøkjara, sum hava lokið eina námsfrøðiliga útbúgving vera settir í starv.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121
Umsóknarfreistin er 4. mai 2005 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Bústovnin á Rúnarvegi**
Att: Leiðarin
Rúnarvegur 6
Fo - 620 Runavík

# Skrivstovuhølir til leigu



Skrivstovuhølir til leigu í yvirhædd á Staravegi 5 uppi á Hálsi.

Sosialurin 341800

**P/F JÁKUP Á DUL**
STARAVEGUR 5 · TÓRSHAVN · TEL 22 47 67

# MB VESTFINNUR TIL SØLU

**Bygdur í Klaksvík í 1971 · Uttan fiskiloyvi**

**Møguleiki er at skaffa fiskiloyvi**
**Báturin er renoveraður frá a-z.**

- 12,3 tons
- 109 m³
- Longd 12,6 m
- Breidd 4,08 m
- Frambygdur
- Nýggjar oljutangar á 1100 litrar
- Nýggja el-talvu
- Alt el útskift
- Nýtt dekk (origonpine)
- Nýtt logar
- Nýtt WC
- Útskift allar seymirnar
- Útskift allar boltarnar
- Stoypt nýggja barlast
- Nýggjan aksil
- Nýtt berðileigi
- Renoverað motorin, ið er 360 HK
- Motorurin Volvo Penta er frá 1994
- Nýggjar styttir
- Nýggja girðing úr syruføstum stáli
- Nýggjan pullart úr syruføstum stáli
- Nýgg innrættan í stýrhúsi

**Til sølu um hóskandi boð fæst**
**Tel 50 59 00**

# Ársfundur í KSF

**Kvinnufelagasamskipan Føroya, verður á Skála leygardagin 21. mai 2005**

Fundarskrá sambært lógini.

Uppskot til viðgerðar á fundinum skulu sendast til KSF, Postbokx 1013, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 4. mai 2005.

Fundurin verður settur

**kl. 11.30 í pensionistahølunum á Skála.**

Tær, ið ætla sær at vera við, skulu siga frá í seinasta lagi 12. mai á telefon:

**44 11 61, Hannelis Bech ella**
**44 11 97, Kristianna Sigvatson**

# Aðalfundur

Vísandi til grein 8 í lógunum Ítróttasamband Føroya, verður hervið lýst til aðalfund, at verða 21. mai 2005.

Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

**Ítróttasamband Føroya**